Tá eg verði stórur

Jákup Hansen

1. Tá eg verði stórur, tá verður tað gott,
   á, hvat eg tá verði glaður;
   á sjógvin eg sleppi dag og nátt
   sum útiróðrarmaður.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

2. Tá fái eg bæði bát og neyst,
   línu, onglar og snøri;
   summar, vetur, vár og heyst
   eg fisk at landi føri.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

3. Til eg verði stórur, eg gleði meg;
   á sumri eg skal ikki blunda,
   við øðrum monnum fari eg
   í bakka at draga lunda.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

4. Í línuna teir binda meg,
   eg sígi í bergi bláa;
   tann fugl, ið situr á rókini,
   eg skal í netið fáa.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

5. Eg haldi, tað verður stuttligt við
   á fjall eftir seyði at ganga,
   at reka lomb við móðurlið,
   í rættini tey fanga.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

6. Láir, spógvar og tjøldur við
   í haganum hava reiður;
   eg lati eggini liggja í frið,
   tí fuglurin tey eigur.

   Her er tað land, sum mær hóvar.

7. Stuttligari er tó tað
enn á fjall at ganga,
tá ið tey rópa grindaboð
og glaða á hvørjum tanga.

Her er tað land, sum mær hóvar.

8. Tann maður, sum tá stendur og slær,
man líggjan frá sær tveita,
til húsa heim hann skundar sær,
til bátin man hann leita.

Her er tað land, sum mær hóvar.

9. Hvør maður við skundi til bátin fer
við sínum roðbuksubrókum,
skuturin fullur av váknum er
og línum og sóknarkrókum.

Her er tað land, sum mær hóvar.

10. So taka teir allir árar í hond
og rógva, har grindin man vera,
teir reka so hana á slættan sand,
har hvalir á háls at skera

Her er tað land, sum mær hóvar.

11. Kann verða, eg sleppi næstu ferð,
tí eg mennist í hvørjum.
Nei, ongastaðni so stuttligt er
at liva sum í Føroyum.

Her er tað land, sum mær hóvar